# planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

## Singstar funnið sín veg til Pubbina

Vælumtókta spælið Singstar er nú so mikið útbreitt, at sjálvt barrir fara undir at gera kappingar, og kjósa ein Singstar vinnara. Pubbin á Tvøroyri er nú farin undir eitt nýtt átak, sum má sigast verða tað fyrsta av sínum slag. Leygarkvøldið verður Singstar kapping á Pubbina á Tvøroyri, og vinnaran fær ókeypis atgongd til Pubbin og Seglhúsloftið fram til 1. februar. Fyrireikararnar siga, at spælið er vorði væl umtókt millum ungdómin og tískil er ynski um at fylgja við rákinum, og geva ungdóminum tað tey vilja hava. Hetta kann sigast at verða eitt nýtt slag av karaoke, einasti munurin er tann, at spælið sjálvt finnur ein vinnara.



## Hetta kanst tú gleða teg til í 2009

Ert tú enn í døpurhuga av at hava sagt farvæl við Carrie, Miranda, Charlotte og Samantha, so er ikki at missa móti, tí 6. februar kemur filmurin He's just not that into you, ið er ein filmatisering av bókini við sama navnið. Við Jennifer Aniston, Jennifer Connely, Scarlett Johansson og Drew Barrymore í høvuðsleiklutunum, er grundarlagið lagt undir einum gentu filmi í somu filmsgrein sum Sex and the City. Bókin er skrivað av Greg Behrendt og Liz Tucillo, ið eisini hevur verið manuskript rithøvundur av Sex and the City , so vónandi verður nógv at hugsa um, tá ein situr aftaná filmin og drekkur cocktails við vinkonunum.

## Spice Girl stjørna vil við í "X-Factor"




Mel B vil fegin hava starv sum dómari í tí ensku útgávuni av "X-Factor". Nú manglar bert at yvirtala Simon Cowell.

Tað er ikki víst at Dannii Minogue vendir aftur til dómaraborðið í "X-Factor". Summi halda, at hon ikki er biðin um at koma aftur, meðan onnur halda at Simon Cowell, ein av teimum fýra dómarunum, ikki ynskir hana aftur. So eru tað summi ið halda, at unga song kvinnan ikki hevur nakað ynski um at halda fram sum dómari. Undir øllum umstøðum er tað rættiliga sannlíkt, at Dannii ikki verður at síggja í komandi "X-Factor" kappingini, og handan pallin bíðar ein ógvuliga spent ung kvinna.
- Ja eg vil gjarna hava starvið hjá Dannii. Simon og eg síggja nógv til hvønn annan í Los Angeles. Hann er fittur, skemtingarsamur og honum dámar væl at práta. Eg má heldur tosa við hann um at gerast dómari, sigur tann fyrrverandi Spice Girl Mel B við Sunday Mirror
Mel B er enntá til reiðar at ferðast aftur til heimlandið orsaka av sjónvarps sendingini.

- Øll mín familja búgva nú í Los Angeles, men eg vil fara aftur til Bretland, um eg slapp við í "X-Factor". Eg vil bert aftur til Bretland fyri okkurt gott. Og eg elski "X-Factor". Tað er ein góð sending, og eg hyggi altíð eftir sendingini tá eg eri heima í Bretlandi, sigur Mel B, í hennara roynd at hava eina almenna starvssamrøðu.

## Facebook í býarlívinum í Føroyum

Facebook er eins og aðrastaðni vorði sera útbreitt, og nýggjasta rákið er at stovna sokallaðar bólkar, ið nú eisini eru komnir til býarlívið í Føroyum.
Á heimasíðuni www.facebook.com er ein bólkur, ið nevnist "Byin.fo Limir 2009. Ókeypis".
Tey ið ynskja at gerast limir í hesum bólki hava sostatt ymsar fyrimunir, ið onnur ikki hava. Tað ber til at fáa avsláttur, umframt at heitið á bólkinum leggur upp til at limirnir í bólkinum fáa eitt hvørt ókeypis í 2009. Eisini verður lagt upp til at limirnir av bólkinum skulu fáa nøkur "limaball", ið sostatt bert er fyri innbodnum gestum. Byin.fo er ikki fyrsta umboð frá býarlívinum ið hevur nýtt Facebook sum ein hátt at sleppa út til fólkið. T.d. kann nevnast Pubbina og Seglhúsloftið á Tvøroyri, har ein javnan fær sendandi tíðindi, um ein er partur av bólkinum hjá teimum. Ymsir tónleikarar nýta eisini høvi at marknaðarføra seg umvegis Facebook, og sjálvsagt eru eisini nógvir felagsskapir ið royna at fáa undirtøku fyri teirra arbeiði umvegis heimasíðuna.
Hetta kann bert verða ein staðfesting av hvussu stóran týdning Facebook nú hevur í tí nútímansgjørda marknaðarføringsheimi numm, og vit føroyingar hava eftir øllum at døma

